# TÍÐINDI

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*– Vit vistu, at nýggj rammuavtala kom í gildi í 2007, og vit vistu, at samstarv við ES er ein drúgv tilgongd*

*Rúna Hilduberg*

# Ein loysn, men...

**- Hetta var ikki tað, eg mælti til, og í mínari verð ikki besta loysnin, men tað týdningarmesta er, at vit eru samdir um at tálma búskapinum, sigur Magni Laksáfoss, fíggjarmálaráðharri**

POLITIKKUR
Leo Poulsen
leo@sosialurin.fo



*Magni Laksáfoss fekk ikki sín vilja, men sigur seg kunna liva við loysnini, sum funnin er.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Búskapurin veksur við áleið 200 til 300 milliónum um árið. Og í løtuni er hann ov heitur, sambært fíggjarmálaráðharranum, sum hevur mælt til ítøkilig tiltøk, fyri at steðga búskaparligu gongdini.

Á samgongufundinum í gjár fekst so semja millum flokkarnar um, hvussu hendan tálman av búskapinum skuldi fara fram. Úrslitið gjørdist ikki tað, sum Magni Laksáfoss hevði mælt til, nevniliga við at steðga og útseta ávísar íløgur, og skera í fiskimannafrádráttinum.

Úrslitið gjørdist hinvegin, at sparingar skuldu fara fram í rakstrinum, svarandi til áleið 200 milliónir. Semja var um, at 30 av hesum skuldi skerast av íløgukarminum hjá landinum, meðan semjan, sum fíggjarmálaráðharrin hevur gjørt við kommunurnar, svara til einar 100 milliónir. Eftir eru so einar 170 milliónir, men av tí at hesar verða tiknar av rakstrinum, verður effektin størri soleiðis, at landsstýrismenninir skulu spara tilsamans 100 milliónir á sínum økjum.

Júst hvussu hetta verður gjørt, verður upp til hvønn landsstýrismann sær at gera av. Somuleiðis má semja finnast millum landsstýrismenninar, hvussu stór sparingin verður á hvørjum øki.

- Eg havi alla tíðina sagt, at mítt uppskot er, at útseta íløgurnar til Sandoyartunnilin og at skerja frádráttin hjá sjómonnum. Men hetta fekk so ikki undirtøku á samgongufundinum, og tað má eg so bara boyggja meg fyri, sigur Magni Laksáfoss.

## Neyðugt at tálma

Íløgukarmurin hjá landinum er í ár upp á 270 milliónir, og hetta er minni enn undanfarin ár. Nú er so gjørt av at skera 30 milliónir av hesum karmi. Hjá kommununum liggur íløgukarmurin um tær 500 milliónirnar, og við tí náttúrliga búskaparvøkstri, sum er, merkir fastlæstur íløgukarmur hjá kommununum í veruleikanum ein niðurskurð.

- Tað finnast bert tríggir hættir at tálma búskapinum upp á. Ein er, sum eg havi skotið upp, at útseta og harvið minka um íløgurnar, ein annar er lógarbundnu útreiðslurnar so sum pensjónir og annað – og triði møguleikin er at skera í rakstrinum. Og tá semja ikki fekst um at minka íløgurnar, var í veruleikanum bert seinasti møguleikin eftir, nevniliga at tálma rakstrarútreiðslurnar, sigur Magni Laksáfoss.

Hann sigur seg ikki vera so avgjørdan um, hvussu búskapurin verður tálmaður, bert tað verður gjørt. Men hinvegin dylir hann ikki fyri, at mátin, sum nú verður nýttur, ikki er hin besti.

Av samtyktum íløgum fyri komandi ár teljast Sandoyartunnilin, Skálafjarðartunnilin, útbyggingin av flogvøllinum, skúladepilin við Marknagilsvegin, ellisheimið í Vági og fiskivinnuskúlin í Vestmanna, umframt smærri ábøtur á vegakervið og annað. Og so sjálvandi tær íløgur, sum longu eru farnar í gongd.

Alt í alt er loysnin, sum funnin er, nakað, sum fíggjarmálaráðharrin kann liva við. Men tað er sum nevnt ikki besta loysnin eftir hansara tykki.

- Nú er tað so álagt fíggjarmálaráðharranum at fremja hesa loysnina, og so verður hon sjálvandi framd. Men vit skulu framvegis minnast til, at búskapurin veit ikki av, at tað er valár í ár, sigur Magni Laksáfoss, fíggjarmálaráðharri.

# Ikki økja útreiðslurnar

**Á samgongufundinum í gjár var semja um, at búskapurin er heitur, og at ansast skal eftir ikki at økja ov nógv um útreiðslurnar fyri komandi fíggjarár**

Tað var við einum ávísum spenningi, at samgongulimir saman við landsstýrismonnum hittust á samgongufundi úti í Tinganesi í gjár.

Tað er eingin loyna, at nýggi fíggjarmálaráðharrin í ávísum førum ikki tykist hava drigið somu línu sum restin av samgonguni, men løgmaður sigur, at breið semja er í samgonguni um búskaparstøðuna.

- Vit vóru samdir um, at búskapurin er heitur í løtuni, um hann so er for heitur, er ein annar spurningur. Í hvussu er var semja um, at nú fíggjarlógararbeiðið kemur fyri, má ansast eftir, at vit ikki fáa ov stóra útreiðsluøking fyri 2008 í mun til verandi fíggjarár, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

Hann sigur víðari, at semja er um, ikki at høgga til við sparingum, eins og heldur ikki verður lagt eftir nakrari einstakari verkætlan. Hetta sagt uttan at løgmaður beinleiðis nevnir Sandoyartunnilin.

Løgmaður vísir víðari á, at fíggjarmálaráðharrin hevur gjørt avtalu við kommunurnar um at ganga eftir somu gøtu sum landsstýrið, og ikki økja útreiðslurnar ov nógv fyri komandi fíggjarár.

Kommunurnar standa jú fyri helminginum av samlaða búskapinum, og tí er neyðugt eisini at fáa tær



*Samgongan var fullmannað á fundinum í Tinganesi í gjár.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

við. Viðvíkjandi privata forbrúkinum er støðan ein onnur. Skulu vit tálma tí, verður neyðugt við politiskum inntrivum, og tað eru ongar ætlanir um, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.